# MC seksti

Mikudagin 4. august fyllir MC Restorff 60 ár.

Seinastu trý árini hevur MC hildið sínar føðingardagar í Grønlandi. Soleiðis er eisini við seksti ára degnum. Dagurin verður hildin saman við manningini umborð á fyrrverandi grønlendska vaktarskipinum Agdlek Y386, sum í fleiri ár var eitt av vaktarskipunum í Grønlandi. Nú eitur skipið Juvel 2 og verður brúkt sum missiónskip til at vitja bygdir í Vesturgrønlandi. MC byrjaði í 2005 við lítla Juvel, har hann hjálpti til við sangi, matgerð o.ø., og nú er hann við Juvel 2.

MC hevur sum øllum kunnugt góðar egинleikar, tá tað snýr seg um tónleik og sang. Grønlendingum dáma væl at syngja, og eitt, tvey, trý – so hevur MC samansjóða nøkur av teimum lokalu ungfólkunum til eina duet, trio ella fleiri, so sangurin verður fjøltáttaður.

Sum fyrrverandi hotelleigari við tænaraútbúgving sum barlast, og matuppskriftum frá góðum kokkum á Hafnia gjøgnum tíðirnar, er MC sera væl egnaður umborð á Juvel 2. Hann og konan kokkast nú umborð, og servisan er sum á Hafnia, tá hon er best, sigur manningin. Aftaná hesi skjótt fleiri árini er MC vorðin ein kenningur á fleiri smáplássum í Vesturgrønlandi. Onkustaðni hevur hann fingið kelinavnið »Marteeraq«, sum merkir lítli Martin.

MC er havnarmaður. Foreldrini vóru Maria, f. Joensen, og Christian Dahl Restorff, bæði úr Havn.

Í meira enn 40 ár hevur navnið MC Restorff verið kent innan føroyskan tónleik. Hann hevur sjálvur og saman við øðrum givið bæði plátur og fløgur út. Hann hevur gjørt orð og løg til bæði andaligar sangir og fosturlandsangir, sum dagliga eru at hoyra í føroysku loftmiðlunum.

Øll sum gjøgnum tíðirnar hava havt eitt hvørt ørindi á Hotel Hafnia hava hitt MC sum ein blíðan og fyrikomandi persón. Síðan hotellið fyri nøkrum árum síðan varð selt, hava MC og Mariann ferðast nógv bæði í Danmark, Grønlandi og aðrastaðni. Eisini hava tey búð í øðrum londum í styttri tíðarskeið. MC hevur eisini havt nógvar ymiskar sendingar og ferðafrásøgnir í kristiligu útvarpsstøðini Lindini.

MC er giftur Mariann úr Fuglafirði, dóttir Rosu og Ditleif Eldevig. Tey eiga døturnar Rósu Mariu, Duritu og Jóhonnu umframt ommu- og abbabørn.

Hevur onkur hug at senda eina heilsan til MC í dag, bert til at senda teldupost til: juvel2@skyfile.com.

-red



*MC Restorff. Myndin er tikin seinasta sunnudag í Niaqonaarssuk í Grønlandi*

## Andlát

**Jenny Gøtuskeggi**, fødd Tausen, ættað úr Vági, andaðist í Viborg mánadagin 2. august, 82 ára gomul.

Mánadagin 2. august andaðist **Helga Andrea Gásadal**, fødd Samuelsen ættað úr Havn, á Landssjúkrahúsinum, 80 ára gomul. Kistan fer úr Kapellinum hósdagin kl. 17.30. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju fríggjadagin klokkan 14.

**John Hammer**, Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi mánadagin, 85 ára gamal.

Kistan við **Jóhan Edvin Jacobsen**, vanliga nevndur Hanneba, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin klokkan 15. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 14 úr Sørvágs kirkju.

**Martin E. Hansen**, Fuglafirði, andaðist sunnudagin 1. august. Jarðarferðin verður úr Siloa hósdagin kl. 13.

**Saloma Thomsen**, Strondum, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 1. august, 89 ára gomul. Kistan fer av Landssjúkrahúsinum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Sjóar kirkju hósdagin kl. 14.

# Merkisdagar

### Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 13. august kunnu Ásla og Tórbjørn Poulsen í Havn halda gullbrúðleyp. Veitsla verður sama kvøld fyri innboðin. Tey sum annars hava hug at hitta brúðarparið eru vælkomin heima í Bóndabrekku leygardagin eftir kl. 15.

### 95 ára føðingardagur

Hósdagin 5. august fyllir Hanna Joensen, ættað úr Mykinesi, 95 ár. Tey ið vilja heilsa uppá Hannu eru vælkomin á Sýnina í Miðvági millum kl. 15 og 17.

### 85 ára føðingardagur

Fríggjadagin 6. august fyllir Andrea á Dul, Tórshavn, 85 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum frá kl. 11 til 15. Tey sum vilja heilsa uppá Andreu eru hjartaliga vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

Hósdagin 5. august verður Jensia Vatnhamar, Argjaboða 80 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Jensiu, eru hjartaliga vælkomin í Róðrarneystið á Argjum leygardagin 7. august frá kl. 17.

### 75 ára føðingardagur

21. august fyllir Elisabeth Joensen í Vági, fyrrverandi fyristøðukvinna hjá heimarøktini, 75 ár. Í hesum sambandi bjóðar Elisabeth til brunch í Billiardhúsinum, leygardagin 14. august, frá kl. 10-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur

Leygardagin 7. august fyllir Knút Poulsen, Eiði, 70 ár. Hann er burturstaddur.

### 50 ára føðingardagur

Leygardagin 7. august verður Jákup Jacobsen maskinmeistari í Haraldssundi 50 ár. Dagurin verður hildin leygardagin kl. 13 fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Haraldssundi. Kl. 19 verður opið hús, har øll eru hjartaliga vælkomin.

---

†

## Andlát

Kunngjørt verður, at okkara elskaði sonur

**Levi Splidt Johansen**
Tórshavn

andaðist í heiminum mánadagin
2. august, 35 ára gamal.

*Familjunnar vegna*
**Jórun og Asberg**

---

†

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, abbi, langabbi og verfaðir

**Martin E. Hansen**
Fuglafjørður

andaðist í heiminum sunnudagin
1. august, 86 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Siloa
hósdagin 5. august kl. 13.00.

**Fyri tey avvarðandi**
**Andrea og børnini.**

---

## TØKK

Øllum tykkum, ið og mintust okkara kæru

**Davinu Mikkelsen**
**av Toftum**

sum andaðist 17. juni, 89 ára gomul, takka vit hjartaliga. Ein serlig tøkk til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim, til prest, kirkjutænarar, sangarar og tey, sum stákaðust í sambandi við ervið í kirkjukjallaranum.

***Familjan***